VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4. Almennur fundur |
| Fundardagur | 25. april 2016 kl. 18:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Møtt: Rósa Samuelsen, Egil Petersen, Albert Ellefsen, Jonhard Joensen, Jónhard Selfoss, Dánial Johansen og Jógvan S. Hansen.
Johannes Ellefsen, Marjus Dam, Jóhannis Joensen, Marin Bláberg og Dánial Thomsen høvdu forfall.
Skrivari: Georg Hansen.

# Yvirlit yvir mál til viðgerðar


| Pkt. | Tekstur | Síða |
|---|---|---|
| 28 | Umsókn um skeinkiloyvi til Nest v/ Spf Johns | 1 |
| 29 | Umsókn um sundurbýt av matr. 93a í Miðvági, Anfinn Hansen | 2 |
| 30 | Umsókn um marknaumskipan millum matr. 50c og 276b í Sandavági | 4 |
| 31 | MBF søkir um stuðul móti at rudda runt Fjallavatn. | 5 |
| 32 | Dráttur bjóðar seg fram, at rudda øki fyri kommununa | 6 |
| 33 | Felags fruktskipan til stovnarnar | 6 |
| 34 | Umsókn um keyp av stykkið til garagu á 12bd í Miðvági | 7 |


**2016-51-1**

## 28. Umsókn um skeinkiloyvi til Nest v/ Spf Johns

### Málsfrágreiðing

John E. Petersen hevur søkt um at fáa skeinkiloyvi í Nest, umsóknin var send Vága kommunu til ummælis. Fyrrverandi eigarin Regin Bláhamar hevur havt skeinkiloyvi. Av tí at málið hevði skund, avgjørdi umsitingin at viðmæla, at John E. Petersen fekk skeinkiloyvi.

VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4. Almennur fundur |
| Fundardagur | 25. april 2016 kl. 18:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Nú skeinkiloyvið verður givið, vísir tað seg, at loyvi eisini verður givið at skeinkja uttandura eftir reglum, sum kommunan setir. Hetta loyvi hevði Regin Bláhamar ikki.
Býráðið má tí viðgera, um loyvi verður givið at skeinkja uttandura og, um loyvi verður givið, undir hvørjum treytum.

**Mentunar- og trivnaðarnevnd, 14. april 2016, pkt. 29:**
Mælt verður til at geva loyvi at skeinkja uttandura, við treytum um at skonkt verður innanfyri matrikkulin

## Avgerð

Samtykt at geva loyvi at skeinkja uttandura til kl. $22^{45}$ frá mánakvøldi til hóskvøld og til kl. 24 fríggjakvøld og leygarkvøld. Loyvt verður ikki at skeinkja uttandura sunnudag.

**2016-41-12**

# 29. Umsókn um sundurbýt av matr. 93a í Miðvági, Anfinn Hansen

## Málsfrágreiðing

Anfinn Hansen søkir um sundurbýti av matr. nr. 93a í Miðvági, sum Anfinn Hansen og systirin Thomina Joensen eiga.
Kortið niðanfyri vísir, at ætlanin er at býta økið í helvt.
Umhvørvisstovan sendir Vága kommunu málið til ummælis.

VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4. Almennur fundur |
| Fundardagur | 25. april 2016 kl. 18:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |




**Tilmæli 15. april 2016, pkt. 41:**
Umsitingin mælir Teknisku nevnd til at viðmæla umsóknini.

**Tekniska nevnd, 15. april 2016, pkt. 41:**
Viðmælt.

VÁGA KOMMUNA

Tel.  +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4. Almennur fundur |
| Fundardagur | 25. april 2016 kl. 18:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

### Avgerð

Viðmælt.

**2016-41-11**

## 30. Umsókn um marknaumskipan millum matr. 50c og 276b í Sandavági

### Málsfrágreiðing

Albert Ari Thomassen og Alma Dalsgarð søkja um marknaumskipan millum matr. nr 50c og 276b í Sandavági.
Broytingin inniber at matr. nr. 50c letur uml. 15 m2 til matr. nr. 276b - hetta er á leið fulla støddin á matr. nr. 50c.



VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4. Almennur fundur |
| Fundardagur | 25. april 2016 kl. 18:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Tilmæli 15. april 2016, pkt. 42:**
Umsitingin mælir Teknisku nevnd til at viðmæla umsóknini.

**Tekniska nevnd, 15. april 2016, pkt. 42:**
Viðmælt

### Avgerð

Viðmælt.

**2016-24-4**

## 31. MBF søkir um stuðul móti at rudda runt Fjallavatn.

### Málsfrágreiðing

MBF heitir á kommununa um stuðla teimum við kr. 7.500,- fyri at rudda runt Fjallavatn. Felagið hevur eisini søkt Sørvágs kommunu um somu upphædd.

**Mentunar- og trivnaðarnevnd, 14. april 2016, pkt. 25:**
Mælt verður frá at veita stuðul, grunda á at kommunan letur ein árligan rakstrarstuðul.

**Fíggjarnevnd, 20. april 2016, pkt. 27:**
Tikið verður undir við tilmælinum hjá M.Tr.N. Semja er um, bert at lata ein stuðul til hvørt ítróttarfelag.

### Avgerð

Samtykt at stuðla við kr. 7.500,-. Peningurin verður tikin av konto fríðkan.

**2016-24-11**

## 32. Dráttur bjóðar seg fram, at rudda øki fyri kommununa

VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4. Almennur fundur |
| Fundardagur | 25. april 2016 kl. 18:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

## Málsfrágreiðing

Flogbóltsfelagið Dráttur bjóðar seg fram at rudda fyri kommununa fyri eina samsýning, sum er rímilig fyri báðar partar.

**Mentunar- og trivnaðarnevnd, 14. april 2016, pkt. 26:**
Mælt verður frá at veita stuðul, grunda á at kommunan letur ein árligan rakstrarstuðul.

**Fíggjarnevnd, 20. april 2016, pkt. 28:**
Tikið verður undir við tilmælinum hjá M.Tr.N. Semja er um, bert at lata ein stuðul til hvørt ítróttarfelag.

## Avgerð

Samtykt loyva teimum at rudda fyri umleið kr. 5.000,-.

**2016-40-13**

## 33. Felags fruktskipan til stovnarnar

## Málsfrágreiðing

Kommunan hevur fingið til vega tilboð frá FK uppá at keypa eina frukt um dagin fyri hvørt barnið í barnaansingini. Samlaði prísurin er umleið kr. 100.000,- um árið.

**Mentunar- og trivnaðarnevnd, 14. april 2016, pkt. 28:**
Mælt verður til at seta fruktskipan í verk til børnini í Sóljugarði og Miðgarði. Smílikullan hevur hesa skipan í dag.

**Fíggjarnevnd, 20. april 2016, pkt. 29:**
Mælt verður til at seta skipanina í gongd aftaná summarfrítíðina.

## Avgerð

Samtykt at seta í verk eina royndarskipan árið út. Skipanin verður fíggja innanfyri verandi játtan.

VÁGA KOMMUNA

Tel.  +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4. Almennur fundur |
| Fundardagur | 25. april 2016 kl. 18:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**2016-41-10**

## 34. Umsókn um keyp av stykkið til garagu á 12bd í Miðvági

### Málsfrágreiðing

Tórður á Presttrøðni søkir um at keypa part av vegaøki (6 x 12 m) við grundøki hansara á matr. nr. 12 bd í Miðvági.
Hann ynskir at byggja garagu á økið. Hjálagt er tekning av garaguni, men hann søkir ikki um byggiloyvi til hetta í fyrstu atløgu.
Tekningin vísir, at garagan eftir ætlan skal vera 8x5m til støddar.

Økið er útlagt sum almenur vegur - parkeringsøki. Verður økið selt burturav, við tí fyri eyga at byggja garagu, fellur tískil eitt stórt øki burtur, sum ikki kann nýtast til parkering. Av tí at hann ætlar at koyra inn 'uppá tvørs' av økinum, verður 'spill-økið' 15 m breitt (teir 8 metrarnir av garagu, umframt 7 metrar av manøvru-øki. Tað er 6 p-básar.
Harumframt vil ein tílík føst konstruktión út í vegin gera útsýnismøguleikarnar verri, við møguligum vandastøðum til fylgju.

VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4. Almennur fundur |
| Fundardagur | 25. april 2016 kl. 18:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |



**Tilmæli 15. april 2016, pkt. 43:**
Umsitingin mælir Teknisku nevnd frá at ganga umsóknini á møti.

**Tekniska nevnd, 15. april 2016, pkt. 43:**
Taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevnd, 20. april 2016, pkt. 30:**
Tikið verður undir við tilmælinum.

## Avgerð

Samtykt ikki at ganga umsóknini á møti.

Tel.  +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4. Almennur fundur |
| Fundardagur | 25. april 2016 kl. 18:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Bók lisin Fundur lokin**

Rósa Samuelsen

Dánial Johansen

Jóhannes Ellefsen

Jógvan Sjúrður Hansen

Jonhard Joensen

Jóhannis Joensen

Marjus Dam

Egil Petersen

Marin S. Bláberg

Dánjal Thomsen

Albert Ellefsen

Jónhard Selfoss